# Støðan í føroyameistaraskapinum í kappróðri

**Eftir róðurin á Vestanstevnu er støðan í føroyameistaraskapinum í kappróðri henda:**

**Fimmmannafør, dreingir**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 38 |
| 2 | Havfrúgvin | 33 |
| 4 | Blikur | 21 |
| 3 | Tjaldrið | 22 |
| 5 | Fípan Fagra | 7 |
| 7 | Royndin Fríða | 4 |
| 6 | Junkarin | 6 |
| 8 | Kollur | 1 |
| 9 | Báran | 0 |
| 10 | Firvaldur | 0 |

**Seksmannafør, kvinnur**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Gongurólvur | 39 FM |
| 2 | Páll Fangi | 27 |
| 3 | Jarnbardur | 22 |
| 4 | Lómur | 20 |
| 5 | Smyril | 12 |
| 6 | Fuglfirðingur | 7 |
| 7 | Fortuna | 5 |

**Fimmmannafør, gentur**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 31 |
| 2 | Drekin | 30 |
| 3 | Sílið | 28 |
| 4 | Havfrúgvin | 26 |
| 5 | Ørnin | 8 |
| 6 | Firvaldur | 7 |
| 7 | Fípan Fagra | 2 |
| 8 | Junkarin | 1 |
| 9 | Kollur | 0 |
| 9 | Tjaldrið | 0 |
| 9 | Hulda | 0 |
| 9 | Tekla | 0 |
| 9 | Beinta | 0 |
| 9 | Havørnin | 0 |
| 9 | Frúgvin | 0 |

**Seksmannafør, menn**

| nr. | stig | |
|---|---|---|
| 1 | Smyril | 36 |
| 2 | Jarnbardur | 32 |
| 3 | Páll Fangi | 23 |
| 4 | Strálan | 20 |
| 5 | Lómur | 10 |
| 6 | Sølmundur | 6 |
| 7 | Gongurólvur | 3 |
| 8 | Sundabáturin | 2 |
| 9 | Snopprikkur | 0 |
| 9 | Kollfirðingur | 0 |
| 9 | Fortuna | 0 |
| 9 | Riddarin | 0 |

**Áttamannafør**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Ørvur | 42 FM |
| 2 | Argjabáturin | 28 |
| 3 | Kvívíkingur | 25 |
| 4 | Knørrur | 19 |
| 5 | Teistin | 12 |
| 6 | Toftabáturin | 4 |
| 7 | Gullbrandur | 0 |

**Tíggjumannafør**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 36 |
| 2 | Nólsoyingurin | 33 |
| 3 | Havnarbáturin | 26 |
| 4 | Vestmenningur | 19 |

# FCK og Rosenborg hittast í kvøld

**Todi Jónsson var tvífaldur málskjútti, tá ið FCK fríggjakvøldið Í Odense vann stórsigur í jubileumsdysti ímóti B1913**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Nú er niðurteljingin til nýggja fótbóltsárið kring Europa av álvara byrjað. Í Danmark fer fótbólturin av álvara á rull annan sunnudag, og longu annan leygardag skal FCK spæla fyrsta landskappingardystin. Hann verður í Ålborg ímóti AaB, og TV3+ sjónvarpsrásin verður á blettinum.

Rásin verður eisini á blettinum, tá ið FCK í kvøld fer at spæla venjingardyst í Noregi. Todi og liðfelagarnir ferðast nógv í hesum døgum. Í gjár fóru teir til Noregs, har teir í kvøld skulu spæla í Frederikstad ímóti besta norska felagnum, Rosenborg. Tann dysturin verður í kvøld klokkan 19, og tá verður, sum nevnt, møguleiki fyri at síggja Toda Jónsson og liðfelagarnar.

At Todi er væl fyri, gav hann ábendingar um fríggjakvøldið. Tá var FCK í Odense, har teir spældu ímóti styrktum B1913 liðið, sum hátíðarhelt 90 ára føðingardagin. FCK vann 9–0. Teir spældu við einum liði í 1. hálvleiki og einum øðrum liði í 2. hálvleiki. Todi var við fyrru trý kortérini. Hann skoraði fyrsta málið, tá ið átta minttir vóru farnir, og hann skoraði eina ferð afturat, áðrenn hann í steðginum fór úr dystinum.

Í annaðkvøld skal FCK spæla í Frederikstad ímóti heimaliðnum. So fara teir aftur til Keypmannahavnar, har teir leygardagin skulu spæla í Gladsaxe ímóti turkiska Galatasaray.

Seinastu árini hevur tað verið soleiðis í Danmark, at meistaraliðið og steypavinnararnir eftir eingilskum mynstri í vikuni undan fyrsta umfarinum í landskappingini hava sett sjøtul á nýggja kappingarárið.

FCK er meistari, og Brøndby er steypavinnari. Tí skuldi dystur verið teirra millum týskvøldið í næstu viku. Men í løtuni tykist tað sum um, at dysturin verður av ongum. Meistaraliðið plagar at eiga heimavøll. Men FCK hevur leigað Parkina út. Í staðin hava teir ætlað at spælt heimadystin í Farum. Men tað sigur Brøndby kortanei til. Teir vilja hava FCK at koma út í Brøndby at spæla, men tað sigurFCK kortanei til.

TV3 eigur rættindini at senda frá dystinum. Teir eru ikki fegnir um naggatódnina og trætuna, sum hevur tikið seg upp millum stóru feløgini í høvuðsstaðnum, og ivaleyst verður talan um fíggjarligt eftirspæl, um eingin loysn fæst á trætuni.

Hjá FCK eru flestu spælararnir væl fyri. Eins deyð er annars breyð, plagar at verða tikið til. Møguleikarnir hjá Toda at vera millum teir fyrstu ellivu eru ikki versnaðir í summarsteðginum. Morten Bisgaard hevur verið skaddur, Peter Møller hevur verið sjúkur í síðstu viku, og fríggjakvøldið í Odense kendi Jörgen Pettersson aftur til vøddaskaðan, sum fyrr í ár hevur plágað í lærinum. Hann er við í Noregi, men tað er fyri at fáa viðgerð og ikki fyri at spæla.

# Kappróðrarúrslit á Vestanstevnu

**51 bátsmanningar róðu FM-róður í Sandavági. Úrslitini vóru hesi:**

**Fimmmannafør, dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 5:02:02 |
| 2 | Havfrúgvin | 5:06:00 |
| 3 | Tjaldrið | 5:14:06 |
| 4 | Blikur | 5:14:12 |
| 5 | Junkarin | 5:14:22 |
| 6 | Fípan Fagra | 5:23:22 |
| 7 | Báran | 5:25:12 |
| 8 | Royndin Fríða | 5:25:22 |
| 9 | Firvaldur | 5:49:15 |

**Seksmannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 5:23:08 |
| 2 | Páll Fangi | 5:25:01 |
| 3 | Gongurólvur | 5:25:03 |
| 4 | Lómur | 5:33:06 |
| 5 | Smyril | 5:39:09 |
| 6 | Fuglfirðingur | 5:58:09 |
| 7 | Fortuna | 6:00:20 |

**Fimmmannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Drekin | 5:26:09 |
| 2 | Blikur | 5:27:08 |
| 3 | Sílið | 5:29:19 |
| 4 | Havfrúgvin | 5:34:00 |
| 5 | Ørnin | 5:36:14 |
| 6 | Junkarin | 05.41.03 |
| 7 | Firvaldur | 5:51:10 |
| 8 | Tekla | 5:56:18 |
| 9 | Havørnin | 5:57:11 |
| 10 | Frúgvin | 5:59:14 |
| 11 | Tjaldrið | 6:02:11 |
| 12 | Kollur | 6:05:21 |
| 13 | Beinta | 6:13:15 |

**Seksmannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 04.59.06 |
| 2 | Smyril | 05.00.05 |
| 3 | Páll Fangi | 05.00.20 |
| 4 | Strálan | 05.01.12 |
| 5 | Sølmundur | 05.01.20 |
| 6 | Lómur | 05.03.04 |
| 7 | Gongurólvur | 05.06.20 |
| 8 | Sundabáturin | 05.10.07 |
| 9 | Hvessingur | 05.14.12 |
| 10 | Riddarin | 05.21.22 |
| 11 | Fortuna | 05.24.11 |
| 12 | Kollfirðingur | 05.27.22 |

**Áttamannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ørvur | 4:40:24 |
| 2 | Argjabáturin | 4:44:13 |
| 3 | Kvívíkingur | 4:45:01 |
| 4 | Knørrur | 4:45:15 |
| 5 | Teistin | 5:03:22 |
| 6 | Toftabáturin | 5:15:08 |

**Tíggjumannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nólsoyingurin | 4:34:16 |
| 2 | Eysturoyingur | 4:38:08 |
| 3 | Havnarbáturin | 4:38:16 |
| 4 | Vestmenningur | 4:46:12 |

# Støðan í sorøkappingini eftir seks FM-róðrar

**Í sorøkappingini, sum er kapping millum fimmmannaførini at sleppa at umboða Føroyar á árligari bátastevnu niðri í Sorø, er støðan henda:**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Sílið dr. | 38 |
| 2 | Havfrúgvin dr. | 33 |
| 3 | Blikur ge. | 31 |
| 4 | Drekin ge. | 30 |
| 5 | Sílið ge. | 28 |
| 6 | Havfrúgvin ge. | 26 |
| 7 | Tjaldrið dr. | 22 |
| 8 | Blikur dr. | 21 |
| 9 | Ørnin ge. | 8 |
| 10 | Fípan Fagra dr. | 7 |
| 10 | Firvaldur ge. | 7 |
| 12 | Junkarin | 6 |
| 13 | Royndin Fríða dr. | 4 |
| 14 | Fípan Fagra ge. | 2 |
| 15 | Kollur dr. | 1 |
| 16 | Junkarin ge. | 1 |
| 17 | Hulda ge. | 0 |
| 17 | Báran dr | 0 |
| 17 | Kollur ge. | 0 |
| 17 | Tjaldrið ge. | 0 |
| 17 | Firvaldur dr. | 0 |
| 17 | Tekla | 0 |
| 17 | Beinta | 0 |
| 17 | Havørnin | 0 |
| 17 | Frúgvin | 0 |

Reglurnar eru tær, at tann bátur, sum hevur flest stig, tá ið kappróðrarárið er liðugt, hevur vunnið kappingina. Stendur á jøvnum, vinnur tann bátur, sum í tíð er longst framman fyri næstbesta bát í sínum bólki til samans. Stendur enn á jøvnum, vinnur tann bátur, sum í stigum er longst framman fyri næstbesta bát í sínum bólki til samans.



# Fimta pláss í World Cup

**Føroysku rógvararnir á danska landsliðnum rigga nú til HM kappingina, sum í næsta mánað verður í Milano**

ALTJÓÐA KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*



*Á danska landsliðnum vóru tær báðar føroysku kvinnurnar Sigrid Svartá (á myndini), sum er ættað úr Saksun, og Katrin Olsen, sum er úr Havnini Mynd: www.krf.fo*

Enn eiga Føroyar ikki limaskap í altjóða róðrarsambandinum. Og sambært formanninum í RSF, Hannisi Joensen, so verður limaskapurin ikki veruleiki nú beinanvegin, sjálvt um tað verður arbeitt við málinum.

– Málið er at fáa limaskap í altjóða samtakinum. Um tað skal eydnast, so mugu vit fáa hjálp frá hinum norðurlondunum. Nú leygardagin vóna vit, at eitt stig verður tikið á tí gøtuni. Tá verður norðurlandafundur í Svøríki, og vit eru tveir, sum fara at umboða Føroyar. Saman við mær verður kappingarleiðarin, Hans David Hansen, við á fundinum, sigur Hannis Joensen.

Tað ræður um at knýta persónlig sambond og at liggja framvið og fáa at vita, hvat gongur fyri seg í altjóða róðrarhøpi, umframt at fáa lut í tilfari, sum hini sambondini á okkara leiðum luta millum sín.



*Kort yvir banarnar, sum róð varð á í Sveis*

### Í fremstu røð

Men hóast tað framvegis tykist vera ein fittur teinur á mál í politisku rógvingini, so luttaka føroyskir rógvarar millum teir bestu í heiminum. Síðsta dømið um hetta var í vikuskiftinum.

Eitt umfar í World Cup var á Rotsee í Luzern í Sveis, og á danska landsliðnum vóru tær báðar føroysku kvinnurnar Sigrid Svartá, sum er ættað úr Saksun, og Katrin Olsen, sum er úr Havnini. Sigrid hevur áður róð við Hvessingi, har hon var við til at vinna FM í 1998, og Kartin var við Jarnbardi 1995 –1999.

Saman við Maria Pertl og Lise Poulsen mannaðu tær fyri Danmark fýrara, sum tað verður nevnt. Fríggjadagin vórðu tær nummar trý í øðrum av bólkunum í innleiðandi umfarinum. Australia vann tað umfarið við tíðini 6.39.83 og kvalifiseraði seg beinleiðis í finaluna. Danski báturin, har helmingurin av manningini var føroyskur, endaði á triðja plássi. Tíðin var 6.44.88, og tær vóru aftan fyri Stórabretland, sum hevði tíðina 6.43.42, og frammanfyri Spania, sum hevði tíðina 6.50.02.

Í uppsamlingar róðrinum, sum tað verður nevnt, leygardagin, endaðu Sigrid, Katrin og hinar báðar á næstfremsta plássinum. Týskland vann við tíðini 6.41.15, og danski báturin hevði 6.42.81. Stórabretland var nummar trý við 6.46.03.

Í sovornum kappingum snýr tað seg í innleiðandi umførunum ofta um taktikk. Heldur enn at leggja alt í og vinna innleiðandi umførini, so ræður tað um at røkka endastøðu, sum ber kvalifikatión til endaumfarið við sær. Tí var tað rættuliga spennandi, tá ið finalan var á skránni sunnudagin.

Í Australia vann finaluna, og tíðin hjá teimum var tíggju sekund betri, enn hon var í innleiðandi umfarinum. Hesa ferð var tíðin hjá Australia 6.39.83. Holland var nummar tvey við tíðini 6.31.09, Týskland nummar trý við tíðini 6.33.01, Stórabretland nummar fýra við tíðini 6.36.05, og danska liðið við føroysku kvinnunum umborð var nummar fimm við tíðini 6.37.66. Tær megnaðu at halda Kina aftanfyri seg. Tíðin hjá teimum var 6.43.13.

Nú eru føroyksu kvinnurnar aftur í Danmark, har tær eru farnar undir fyrireikingarnar til næstu og ovurhonds stóru avbjóðingina, sum stendur fyri framman. Tað er HM kappingini, sum í næsta mánað verður í Milano í Italia.

## Dánjal eygleiðari í Liktinstein

**Formaðurin í Fótbóltssamband inum skal næstu tvær vikurnar verða eygleiðari til EM-kapping fyri U19 lið í Liktinstein**

EYGLEIÐING
*Eyðun Klakstein*

Mánadagin fór formaðurin í Fótbóltssambandinum – leirvíkingurin Dánjal Andreasen – til Liktinstein í almennum UEFA-ørindum.

Hann skal næstu tvær vikurnar verða eygleiðari til EM-endaspælið fyri U19 landslið.

– UEFA hevur eygleiðarar til allar dystir, og uppgávan hjá okkum verður at tryggja, at alt fer rætt fram, sigur Dánjal Andreasen.

Hetta er fyrstu ferð, at hann hevur hesa uppgávuna til dystir hjá UEFA.

Kappingin í Liktinstein heldur fram til 26. juli, tá ið finalan í kappingin verður.

# Danir skuffaðu

**Í sterku stórmeistarakappingini í Esbjerg, Vesterhavsturneringen, fingu donsku topptelvararnir harða viðferð frá russum, indarum og bretum.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Síðani Bent Larsen, sum nú er vorðin 68 ára gamal, gavst at telva burturav (hann luttekur tó í kappingum av og á), hava danir ikki havt ein veruligan telvara í heimsklassa.

Í 60´unum og 70´unum átti Bent Larsen pláss millum heimselituna, og onkrar ferðir var hann í topp trý á altjóða styrkilistanum. Leingi varð Larsen mettur sum næstmætasti telvari í vesturheiminum, eftir Bobby Fischer.

Sovjet hevði síðani 30´unum átt heims-meistararnir, og ikki fyrrenn í 1972 bleiv hesin dominansur brotin, tá Fischer vann á Spassky í Reykjavík. Í 1975, tá Karpov varð kosin heimsmeistari, hava russar tó aftur havt ræðið á talvítróttinum.

Loksins, í 1990, megnaði Curt Hansen at yvirtaka plássið sum sterkasti dani. Hann vann seg uppá eitt vælljóðandi fjúrtanda pláss í heiminum í 1993, men stokkut varð gleðin. Seinastu tíggju árini hevur hann havt nøkunlunda sama ratingtal (ca. 2620), og røkkur tað í dag einans til eitt pláss í tyngra endanum av topp 100.

### Krúnskifti

Heilt fram til 2001 kundi Curt Hansen brosa sær av heitinum sum sterkasti danski telvari. Tá bardi Peter Heine Nielsen, 30, nevnliga seg framum Curt. Peter Heine er ein ágrýtin og seriøsur telvari og ætlar sær meir enn síni 2636 ratingstig siga okkum.

Arvurin eftir Bent Larsen er tungur at bera og ilt er at ímynda sær, at ein dani í nærmastu framtíð fer at nærkast heimselituni. Nógv ung talentir finnast á flatlondum, so møguliga um eini tíggju ár síggja vit danskan telvara í topp 10.

### Vesterhavsturneringen

Hin átjanda Vesterhavsturneringen fekk tríggjar vinnarar. Favoritturin Alexey Dreev úr Russlandi, bretski Luke McShane og indarin Krishnan Sasikiran. Teir vóru allir í flokki fyri seg. Endaliga støðan talar fyri seg.

| | |
|---|---|
| Dreev | 6,5 |
| McShane | 6,5 |
| Sasikiran | 6,5 |
| C. Hansen | 4,5 |
| Peter Heine | 4,0 |
| Krasenkow | 4,0 |
| Dominguez | 4,0 |
| Bruzon | 3,5 |
| Schandorff | 3,5 |
| Koneru | 2,0 |

Tað varð allarhelst eisini ein kapping í sjálvari kappingini millum donsku telvararnar. Óvæntað megnaði Peter Heine ikki at blanda seg í oddastríðið. Peter Heine iðrar seg ivaleyst. Curt Hansen hevði møguleika at vinna sær eitt triðja pláss við at vinna á Sasirikan í seinasta umfarinum, men mátti tó lúta. Hann endaði á einum heiðurligum fjórða plássi og bleiv fremsti dani.

Triði danin, Lars Schandorff, leikti sjey javnleikir og tapti tvey talv. Hann var næstlægst rataður og var tí úrtøka hansara á gongdari leið.

Í gjár, 14. juli, byrjaði Politiken Cup í Keypmannahavn, sum eitt nú Peter Heine luttekur í. Seks føroyingar fara at royna seg; John Arni Nielsen, Flóvin Tór Næs, Hans K. Simonsen, Olaf Berg, Herluf Hansen og Jákup á R. Andreasen. Kappingin endar 25. juli.

## Talvið hesa vikuna

**Curt Hansen (2618) - Koneru,H (2467)**
**18th North Sea Cup, Esbjerg (4), 2003**

1.Rif3 d5 2.d4 Rif6 3.c4 e6 4.Ric3 Ribd7 5.Bf4 dxc4 6.e3 Rid5 7.Bxc4 Rixf4 8.exf4 Rib6 9.Bb3 Be7 10.0-0 0-0 11.Re1 c6 12.Fe2 Rid5 13.Rixd5 cxd5 14.Rad1 (Støðan tykist jøvn og einki nevnivert er hent enn) 14...Bf6 15.Rie5 Bd7 16.g3 Bxe5 17.dxe5 Bc6 18.Rd4 (Forðar svarta bispinum vaktan til lívs, samstundis sum rókurin verður sentraliseraður) 18...f5 19.exf6 Rxf6 20.Fd2 Fd6 21.Re5! Raf8 (Svartur kann bert bíða eftir hvat hvítur finnur uppá) 22.h4 Bd7? (Fyrsti veruligi feilur, sum eisini gevur hvítum vinnandi fyrimun) 23.Bxd5! exd5 24.Rdxd5 Fa6 25.Rxd7 Fxa2 26.Rxb7 Fb1+ 27.Kg2 Rb6 28.Fd5+ Kh8 29.Ff7! og svartur gavst t.d vegna 29...Rg8 30.Re8! og mát á g7 kann ikki forðast 1-0